ítróttur

Nr. 32 • týsdagur • 17. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

TB vann triðja árið á rað

Eingin tekur TB, tá tað ræður um steypakappingina. Triðja árið á rað gjørdust kvinnurnar av Tvøroyri steypavinnarar, og harvið vunnu tær sær steypið til ognar

FLOGBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Eina viku undan steypafinaluni hjá kvinnum hittust finaluliðini bæði, Dráttur og TB, á Giljanesi, og tann dystin vann Dráttur sannførandi á føroyameistarunum. Tí var roknað við einari javnari og spennandi finalu í høllini á Hálsi leygardagin, men hóast Dráttur gjørdi eitt sprell við at vinna annað sett, so vann TB ein tryggan steypasigur.

Vágakvinnur nógvar nervar

Fyrsta sett gjørdist ongantíð spennandi. Tað var týðuligt, at spælararnir hjá Drátti vóru ógvuliga nervøsar, og kommunikatión millum leikararnar á liðnum var nærum ikki til staðar.

Hinumegin netið lá væl fyri hjá tvørakvinnum. Væl stuðlaðar av sínum ótrúligu viðhaldsfólkum, sum veruliga eiga eina tøkk fyri at seta sín heilt serliga dám á steypafinaluna, runnu tær Drátt um koll í fyrsta settinum. Áskoðarafjøldin hjá TB er nakað heilt serligt, og tað var stórt spell, at tey ikki vóru verandi til mansfinaluna, tí tá var rómurin í høllini als ikki tann sami, og tað sjáldsama hendi, at tað vóru færri áskoðarar til mansfinaluna enn til kvinnufinaluna.

Fyri at venda aftur til sjálvan dystin og fyrsta settið, so var nógv meiri bit í álopinum hjá TB enn hjá vágakvinnum. Nógv meiri vilji og kraft var í smashunum hjá TB, og tær dugdu sera væl at finna tómrúmini í móttøkuni hjá Drátti. Ikki minst lá væl fyri hjá Ingun Midjord, sum ferð eftir ferð fekk upplegg á miðjuni, sum hon langaði í gólvið hinumegin netið. Dráttur megnaði ongantíð at fóta sær í hesum settinum, og áðrenn tær vistu av, hevði TB vunnið settið 25-11!

Dráttur ger ein vørr

Fyrsta settið gav óivað vágakvinnum ein ordans hvøkk, og tað skal sigast, at tær megnaðu væl at reisa seg í øðrum setti, tá tær fingu munandi betur skil á spælið hjá sær. Hóast TB byrjaði settið betur, kom Dráttur spakuliga fyri seg, og tá so stóra stjørnan hjá Drátti, Nicolina Alter, kom fyri seg, kom Dráttur eisini fyri seg, samstundis sum TB ikki var eins sannførandi sum í fyrsta settinum.

Nú gjørdist dysturin knappliga ein heilt annar. Móttøkan hjá Drátti batnaði munandi, og servirnar sótu eisini væl. Settið tískil væl meiri spennandi enn tað fyrsta, og undirhaldsvirði hækkaði tilsvarandi.

Avgerðin í hesum settinum kom helst, tá ið støðan var 18-19 til Drátt. Næsti bólturin gjørdist ein sera long duell, sum vágakvinnur til endans vunnu og komu á odda 18-20! Hetta gav teimum neyðugu innspræningina til síðstu bóltarnar í settinum, og tær komu á odda 19-24, men TB vann næsta bóltin og so var 20-24. Men so servaði Winnie hjá TB bóltin út, og harvið hevði Dráttur tryggjað sær næsta settið, og støðan í settum var 1-1, og dysturin púra opin.

TB betur skipað

Í triðja settinum var ongantíð nakar ivi um, hvat var betra liðið. Tvørakvinnur høvdu alt settið munin á Drátti, og tað var týðuligt, at TB var væl betur skipað enn mótstøðuliðið. Tað tóktist sum um at spælararnir hjá TB vóru meiri greiðar yvir sínar uppgávur og sítt øki á vøllinum, meðan spælið hjá Drátti ofta var rættuliga óskipað.

Nú var liðskiparin hjá TB, Gudrid Nolsøe, eisini komin fyri seg eftir eina heldur trilvandi byrjan upp á finaluna, og tað gjørdi ikki støðuna verri hjá aldursforsetanum í føroyskum ítrótti.

Hjá Drátti hinvegin fór spælið aftur út av lagi. Alt ov nógv ábyrgd bleiv løgd á Nicolinu Alter, og hóast hon er ein framúr spælari, so megnar hon ikki at vinna finaluna einsamøll. Bróðurparturin av uppleggunum hjá Drátti vóru til Nicolinu, meðan hinar vóru statistar. Tað gjørdi ikki støðuna hjá Drátti betur, at hevingarnar hjá teimum alt ov ofta vóru nógv ov óneyvar, so at illa bar til at fáa ordilig smash ígjognum.

TB hevði leiðsluna alt settið sum tað var, og tað var eisini rættuliga sigandi fyri settið, at seinasti bólturin, ið vann TB settið, var eitt kiks frá Drátti. TB vann settið 25-16.

TB tryggjaði sær steypið til ognar

Í fjórða setti skifti spælið nokk so fitt. TB legði best út og legði seg greitt á odda, men Dráttur kom sterkt aftur. Liðini gjørdu skiftust um at gera nøkur hál og ogna sær eina trý til fýra stig á rað, men so hvørt sum settið leið, gjørdist tað truplari hjá Drátti at halda tørn við TB.

Tvørakvinnurnar tevjaðu gull, og samstundis fóru høvdini hjá vágakvinnunum at hanga. Stóra fjølbroytni í álopsspælinum hjá TB gjørdi eisini, at verjuspælið hjá Drátti bleiv alsamt meiri og meiri stressað, og nógvar misskiljingar vóru millum leikararnar. At Dráttur samstundis eisini fór at kiksa fleiri servir, kostaði teimum dýrt, og tað var bara ein spurningur um tíð, áðrenn TB-leikararnir og stóra áskoðarafjøldin av Tvøroyri kundu hevja armarnar í sigursrúsi.

TB var á odda 23-17, men Dráttur vann bóltin og roynt at verða at gera eitt síðsta sprell. Men ógvuliga hóskandi fyri gongdina í dystinum fór servin hjá Sólgerð út um vøllin, og harvið hevði TB ognað sær ikki færri enn seks dystarbóltar. Tað eydnaðist Drátti at verja fyri tí fyrsta av teimum, men í næstu royndini tryggjaði TB sær steypið til ognar. Tær svørtu og hvítu av Tvøroyri tóku ímóti servuni hjá Drátti, og uppleggið til Marinu Popovic sat har tað skuldi, og hon langaði bóltin umvegis blokkin hjá Drátti og heim. Harvið hevði TB vunnið fjórða settið 25-19, og finaluna 3-1 í settum. Steypið var á veg suður um fjørðin aftur, og nú kemur tað ongantíð norður aftur, tí TB hevur nú ognað sær tað!

Gott fyri sjálvsálitið

Hóast sín unga aldur er 19 ára gamla Ingun Midjord ein av berandi kreftunum á liðnum hjá steypavinnarunum av Tvøroyri. Hon var sum vera man ovurfegin, tá ið vit hittu hann við gullkrónu um hálsin í høllini á Hálsi leygardagin

FLOGBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Hon var ein av bestu leikarunum á vøllinum í finaluni leygardagin, og tey mongu smashini hjá henni vóru við til at tryggja aldursforsetanum innan føroyskan ítrótt enn eitt steyp leygardagin. So tað var eingin at siga til, at 19 ára gamla Ingun Midjord var pávastolt, tá ið vit fingu orðið á hana.

Heilt góður dagur

Vit spurdu Ingun, hvussu tað bar til, at tær eina viku framman undan kundu tapa greitt fyri Drátti, og nú í finaluni vinna sannførandi: - Vit vóru øgiliga uppsettar til dystin í dag, og vit vildu prógva, at dysturin í Vágum herfyri var eitt mistak, ið vit bert gera einaferð. Vit tóku eisini dystin í Vágum upp á band, og tað hava vit sitið og hugt eftir í vikuni, og út frá tí hava vit gjørt fleiri rættingar, ið eisini hjálptu okkum í dag, sigur Ingun Midjord.

Somuleiðis sigur Ingun, at eftir hennara tykki hevur TB eisini ein breiðari hóp enn Dráttur, og tað kemur til sjóndar í slíkum dystum, har nógv stendur upp á spæl. At enda sigur gullvinnarin av Tvøroyri, at sjálvur finaludagurin var ein heilt góður dagur hjá TB, har tær veruliga raktu dagsformin, og hetta gevur teimum ein ordiligan íblástur av sjálvsálitið undan seinastu umførunum í landskappingini. Ingun sigur eisini, at Dráttur spældi langt frá upp til sítt allarbesta, og tí gjørdist sigur rættuliga tryggur.

Árið er ikki liðugt

Hóast tapið fyri tvørakvinnum í steypafinaluni, so sigur liðskiparin hjá Drátti, Herborg á Mýrini, at kappingarárið hjá teimum er alt annað enn liðugt

FLOGBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað var ein ikki sørt vónbrotin liðskipari hjá Drátti, Herborg á Mýrini, ið Sosialurin hitti beint eftir at ÍSF-fortsetin, Heðin Mortensen, hevði handað heiðursmerkir og steyp leygardagin.

Alt ov nógvar nervar

Bert eina viku undan finaluni hevði Dráttur vunnið trygt á júst TB, so hvussu kann tað bera til, at TB vann so sannførandi í finaluni spurdu vit Herborg: - Vit høvdu alt ov nógvar nervar undir dystinum, og av tí sama vóru tað fleiri, ið eisini vóru bangnar fyri at spæla. Nógvi gangurin í høllini nervaði okkum eisini, tí vit fingu næstan ikki tosað saman undir dystinum, sigur Herborg.

Eisini sigur liðskiparin hjá Drátti, at eftir hennara tykki blivu alt ov fáir spælarar brúktir í dystinum, og alt ov stór ábyrgd lá á útlendsku stjørnuni hjá liðnum, Nicolinu Alter. Hetta sást eisini aftur í spælinum, tí tey allarflestu uppleggini lógu til Nicolinu, sigur Herborg á Mýrini.

Men er kappingarárið hjá Drátti nú komið at enda, ella hava tær nakað at berjast fyri framvegis? - Árið er als ikki liðugt fyri okkara viðkomandi, sigur Herborg og leggur afturat, at einki av hinum liðunum skal rokna við at fáa nakað sum helst forerandi frá teimum í teimum umførunum, ið eru eftir at leika.

VIRKISLEIÐARI

Sókt verður eftir virkisleiðara til Kovin.

Á Kovinum arbeiða 10-15 fólk og í regnatíðini nakað fleiri. Kovin framleiðir sildarsjóðar vørur, einkultur frystar og saltaðar vørur.

Vit kanna bjóða tær:
*Eitt fullbroytt starv í vinarligum arbeiðsumhvørvi.
*Eina fakliga arbeiðslýting við samskifti við kundar sína og vaktarar.
*Framleiðslu og sunning av lívsgrunnum.

Krav til tín:
*Fiskivinnuútbúgving ella liknandi.
*Fakligt vitan um innanhýsilit HACCP ella annan standard.
*Góð samstarvsevnir
*Kunnskap til tekniki
*Hug til leiðslu
*Kreativitet, sjálvsmegnd vørur

Lønsamt avtalu.

Skriftlig umsókn skal verða Kovinum í hendi áðrenn 09-03-04.

KOVIN
Hillingatangi 12
FO 360 Sandavágur
att: Albert Ari

KOVIN seafood

WWW.SMYRIL-LINE.COM

púra vitleyst... Summartilboð

2 vaksin og 2 børn við bili

DANLAND er vorðið eitt hitt best umtókta ferðamálið hjá føroyingum. Danland frítíðardeplarnir hava vælinnrættaðar íbúðir við køki og nógv frítíðartilboð eru fyri bæði vaksin og børn við bili.

Danland úr 7.950,-

Íroknað er: Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku fyri 2 vaksin og 2 børn.

1 vika í Danland-íbúð

2 vaksin og 2 børn við bili

SKALLERUP KLIT FERIECENTER er stórur nútímans frítíðardepil av høgari góðsku, ið er við strondina millum Blokhus og Hirtshals. Har er subtropiskt baðiland, bóndagarður, ítrivshallir og alskyns uttandura hentleikar.

Skallerup Klit úr 9.400,-

Íroknað er: Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter fyri 2 vaksin og 2 børn við bili.

1 vika á Skallerup Klit

2 vaksin og 2 børn við bili

1 vika á Pers Hotel

Pers Hotel úr 6.890,-

Íroknað kostnaðin: Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost, fyri 2 vaksin og 2 børn.

Í risa stuttleikaparkini 40 km úr París møtir tú kendu teknisøgufigurunum »live«.

2 vaksin og 2 børn við bili

Fantastisk ferð fyri alla familju

Ferðin yvir øllum ferðum

1 vika í Disneylandi í París

Disneyland úr 18.500,-

Íroknað er: Ferð fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil uppihald 5 nætur á Hotel Santa Fe í Disneylandi á dupultkamari við 2 uppreiðingum og uppihald 1 nátt á hotelli á út- og heimferðini.

2 vaksin og 2 børn við bili

1 vika á DanCenter summarhúsi

Summarhús úr 7.780,-

Íroknað er: Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili.

1 vika á Hotelli í Íslandi

2 vaksin og 2 børn við bili

Summarhús í Hetlandi

Hetland úr 6.980,-

Íroknað er: Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili.

Fyri hvønn ferðandi

Ísland úr 4.108,-

Íroknað er: Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í dupultkamari við wc/bað á Fosshotelli í 7 nætur.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo